# **Brunasamtykt fyri Miðvágs og Sandavágs kommunur.**

§ 1.
***Lógligt grundarlag.***

1) Fyri sløkkiliðið í kommununum er galdandi:
a) ásetingar í løgtingslóg nr. 78 frá 12. juni 1986 um eldsbruna o.a.
b) kunngerðir sambært brunalógini
c) henda samtykt sum er sambært § 5 í brunalógini.

§ 2.
***Fyristøðan hjá sløkkiliðnum***

1) Vegna bygdaráðini hevur felagsbrunanevndin fyristøðuna av sløkkiliðnum. Nevndin er skipað soleiðis við 5 limum:
Miðvágs- og Sandavágs kommunur tilnevna hvønn sín lim, sum eisini eru limir í bygdaráðnum.
Miðvágs- og Sandavágs kommunur tilnevna ein lim í felag.
1 limur er felags brunaumsjónarmaðurin.
1 limur er tilnevndur av fútanum.

2) Bygdaráðini tilnevna limir sínar eftir hvørt kommunuval.
Nevndin skipar seg sjálv við formanni og næstformanni.
Formaðurin ella minst 2 limir boða til fundar.

§ 3
***Skipan og tænastuviðurskifti hjá sløkkiliðnum.***

1) Bygdaráðini seta sløkkiliðsfólk, sum brandnevndin tilmælir.
Bygdaráðini seta felags brandmeistaran (brunaumsjónarmannin) eftir at góðkenning er fingin frá brunaumsjón landsins.
2) Setanartreytir, samsýning og onnur fíggjarlig viðurskifti verða ásett av bygdaráðunum eftir tilmæli frá brunanevndini.
3) Brandmeistari hevur dagligu leiðsluna av sløkkiliðnum og ábyrgdina av , at sløkkiamboðini og annað verða røkt. Tá brandmeistarin hevur forfall, er varamaður í hansara stað.
4) Brandmeistarin hevur ræðið á staðnum meðan eldsløkking og bjargingararbeiði fer fram. Tá brandmeistarin hevur forfall hevur varamaður hansara ræðið ella annar persónur, sum brandmeistarin biður ella løgreglan kann góðtaka.
5) Brandmeistarin skal skipa fyri sløkkiliðsvenjingum.

§ 4
*Kommunala tilbúgvingin.*

1) Bygdaráðini taka, eftir tilmæli frá brunaumsjón landsins, avgerð um útvegan av størri sløkkiamboðum, samtykkja rakstrarútreiðslur fyri hald og endurkeyp av sløkkiamboðum, røkt av hølum, og fyri útbúgving v.m.

2) Sløkkiútgerðin er skrásett á skjali merkt nr. 1.

§ 5
***Sløkkiamboð kravd í bygningum og virkjum.***

Brandmeistarin hevur eftirlit við sløkki- og bjargingaramboðum, sum eru kravd av brunamynduleikunum, og hevur ábyrgd av at tey eru til staðar og at tey virka.

§ 6
***Vatnveiting.***

1) Vatnveiting til eldsløkkingar kann fáast úr brandpostum, vøtnum og møguligum vatngoymslum og áum.
2) Brandpostar skulu setast í samráð við brunanevndina.
3) À korti, merkt skjal nr. 2, skal vera víst hvar í kommununum brandpostar eru, og hvaðani sløkkivatn eigur at verða tikið, í vøtnum, áum o.t.
Støðini har sløkkivatn verður tikið, skulu eftirhyggjast minst 2 ferðir um árið.

§ 7
***Fráboðan.*** -

1.) Fráboðan um eld og vanlukku skal gerast við at ringja 000
2.) Sløkkiliðini kunnu verða fráboðað frá alarmsentralinum við at lúður ýlir 2 - 3 minuttir, og við at ringt verður á brandstøðina har nærri frágreiðing verður givin. Í serligum førum kann verða ringt beinleiðis til sløkkiliðsmenninar.
Sløkkiliðið, sum verður fráboðað, er skrásett á skjali nr. 3.

§ 8
***Gildi og endurskoðan.***

Brunasamtyktin fær gildi frá 26/3 1996, og skal endurskoðast 5 hvørt ár.

Henda brunasamtykt er góðkend á bygdaráðsfundi:

Miðvágs bygdaráð hin 21.03 1996 ..........

Sandavágs bygdaráð hin 21/3 1996 ..........

Brunasamtyktin verður við hesum góðkend.

Brunaumsjón landsins hin 26/3 1996

Peter Olsen